## Sviar høvdu valt broyting

Var val til svenska Ríkisdagin í dag, høvdu sviar fingið eina sosialdemokratiska miðvinstrastjórn. Meiningakanningar í seinastuni hava víst, at tað gongur niður á bakka hjá teimum smáu flokkunum á høgravonginum, og at ein teirra, Kristendemokratarnir, høvdu rokið út úr Ríkisdegnum, var val nú. Hinvegin hava teir smáu flokkarnir vinstrumegin miðjuna framgongd, og sambært teirri seinastu meiningakanningini eru vinstraflokkarnir umleið sjey prosentstig framman fyri flokkarnar høgrumegin miðjuna.



## Heath Ledger vann Golden Globe

Í gjárkvøldið var árliga Golden Globe handanin, og sum væntað fekk Heath Ledger, sáli, eina heiðursløn fyri sín leiklut sum Jokarin í Batmanfilminum ”The Dark Knight”. Christopher Nolan, sum stjórnaði filminum, tók ímóti prísinum til Ledger, og hann staðfesti, at við deyða Legders er eitt stórt gapandi hol rivið í framtíðina hjá biografunum. Kate Windslet vann tvær heiðurslønir fyri hjáleiklutin í "The Reader" og fyri høvuðsleiklutin í ”Revolutionary Road”. Mickey Rourke gjørdi comeback, tá hann fekk ein Golden Globe fyri sín høvuðsleiklut í ”The Wrestler”. ”VickyCristinaBarcelona” varð kosin besta komedia, men heilt stóri vinnarin gjørdist bretski filmurin ”Slumdog Millionaire”, sum fekk fýra prísir.

# Kringvarpið verður stevnt

**Stríðið um starvsfólkið í Kringvarpinum harðnar alsamt og bakkar leiðslan í Kringvarpinum ikki fyri Starvsmannafelagnum, er ógvuliga sannlík, at Kringvarpið verður stevnt**

KRINGVARPIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Bakkar leiðslan í Kringvarpinum ikki fyri Starvsmannafelagnum, er tað ógvuliga sannlíkt, at Kringvarpið verður stevnt.

Tað staðfestir Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum.

Stríðið um starvsfólkið í Kringvarpinum harðnar alsamt og nú er tað komið hartil, at Starvsmannafelagið hevur sett Kringvarpinum treytaleys krøv.

Í fyrra lagi hevur Starvsmannafelagið kravt, at Kringvarpið afturkallar ætlanarskrivini um at siga sjey starvsfólkum, sum eru limir í Starvsmannafelagnum, upp.

Samstundis setti Kringvarpið ein journalist í starv nýggjársaftan og Starvsmannafelagið krevur eisini, at tann starvssetanin verður ógildað.

Hinvegin hevur Kringvarpið tvíhildið um, at onki skeivt er farið fram og allar ásetingar eru hildnar og at tað eru sparingar, sum eru orsøkin til uppsagnirnar.

Somuleiðis staðfestir Kringvarpið at ætlaðu sparingarnar og tað, at ein journalistur er settur, kunnu ikki samantvinnast.

- Journalisturin er settur tí at eitt starvsfólk á Degi & Viku segði seg úr starvi í november mánaða, hevur stjórin í Kringvarpinum sagt.

### Onki grundarlag

Starvsmannafelagið er av teirri ivaleysu sannføring, at haldgott grundarlag er ikki fyri uppsagnunum.

- Kringvarpið hevur ført fram, at uppsagnirnar eru neyðugar fyri at spara, men okkara áskoðan er, at uppsagnartíðin er so long, at lítil og ongin sparing stendst av uppsagnunum.

- Hinvegin hevur Kringvarpið onki gjørt fyri at kanna eftir um tað ber til at sleppa undan uppsagnum við at bjóða fólki at arbeiða parttíð ella við at gagnnýta ásetingarnar í eldrapolitikkinum í sáttmálanum nakar.

- Talan kann eisini verða um natúrliga frágongd í einum ári.

Eisini hevur Kringvarpið sett nýtt fólk í starv, samstundis sum arbeitt verður við at siga átta fólkum upp, hóast vit heittu á leiðsluna um at lata vera við at seta starvið.

- At nýtt fólk verður sett, samstundis sum arbeitt verður við uppsagnum, vísir, at tørvur er ikki á at siga fólki upp fyri at spara.

Tá ið hetta nýggja fólkið varð sett, varð starvið bara lýst á heimasíðuni hjá Kringvarpinum og tað heldur Starvsmannafelagið ikki er nøktandi.

- Treytin er, at øll størv skulu lýsast leys og tí halda vit, at tað er sáttmálabrot, tá ið eitt starv bara er lýst á heimasíðuni hjá Kringvarpinum.

- Tað er eisini sáttmálabrot og brot á almenna setanarpolitikkin, at álitisfólkið á stovninum ikki hevur fingið málið til ummælis og skal vera við í setanarbólkinum.

### Stevna

Selma Ellingsgaard staðfestir, at Starvsmannafelagið góðtekur undir ongum umstøðum at sáttmálin verður brotin, uttan at tað fær avleiðingar

Tað er eitt ógvuliga prinsippielt mál fyri okkum, leggur hon afturat.

Forkvinnan í Starvsmannafelagnum sigur, at hesin spurningurin er so prinsipiellur, at felagið vil ikki lata hetta fara afturvið borðinum.

Men um talan verður at seta tiltøk í verk ímóti Kringvarpinum, vil hon ikki siga nakað um enn.

Hinvegin staðfestir hon, at slakar Kringvarpið ikki, er tað ógvuliga sannlíkt, at Starvsmannafelagið fer at stevna Kringvarpinum.

Sigur tú við hesum, at Starvsmannafelagið hevur gjørt av, at fær tað ikki viðhald, verður Kringvarpið stevnt?

- Tað er í øllum førum ógvuliga sannlíkt. Vit eru sannførd um, at vit hava rættin á okkara síðu so vit fara at gera alt, sum stendur í okkara makt fyri at fáa okkara rætt, sigur Selma Ellingsgaard.

Endar hetta við stevning, verður kravið í fyrra lagi, at setanin nýggjársaftan, tá ið nýggjur journalistur varð settur, verður ógildað.

Í øðrum lagi verður kravið, at uppsagnirnar verða tiknar aftur.

Selma Ellingsgaard sigur, nú fara teir sjey limirnir, sum ætlanin er at siga upp, at geva sítt svar upp á ætlanarskrivini og har verður fyrivarni tikið fyri at fara víðari við málinum.

- Endar tað við, at talan verður um stevning og at vit fáa viðhald í, at uppsagnirnar eru ógrundaðar, veður sjálvandi eisini talan um at krevja endurgjald, sigur forkvinnan í Starvsmannafelagnum.




*Stríðið um Kringvarpið harðnar og tað er ógvuliga sannlíkt, at posturin kemur við eini stevning fyrsta dagin, sum kann fáa víttfevndar avleiðingar fyri stovnin*

# Spam við fartelefonum gera um seg

**Seinastu dagarnar hava fleiri fólk fingið ein sms, sum sigur seg vera frá Nokia. Í sms'inum verður sagt, at tú hevur vunnið 110.000 bretsk pund. Men hetta er Spam, ávarar Føroya Tele.**

ÁVARING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Síðan 4. januar hava alsamt fleiri føroyingar fingið eitt undarligt sms sendandi frá einum útlendskum nummari. Í sms-inum stendur soleiðis:

»Congrats! Your mobile no. Has won 110,000 GBP on this year Nokia mobile reward scheme. To claim call +447045757280 or email: claims_nokia@live.co.uk«

Tað byrjaði tann 4. januar, tá 55 slík smsir komu til landið. Síðan vakst tað til 137 dagin eftir, og víðari til 241 tann 6., 204 tann 7., 101 í gjár og 159 smsir í dag klokkan 13.59.

Tað sum mest sannlíkt hendir, tá tú ringir til hetta nummarið, er at tú verður beindur inn á onkra tænastu, sum so kostar tær eina rúgvu, og sum brotsmennirnir vinna pening við.

- Teir fyrstu dagarnir sær tað út, sum tað kemur frá TDc men eftir 6/1 bleiv tað broytt til india. Hetta er nøkur følsk nummur, so tað er næstan ómøguligt at finna fram til teir í senda tað, men tað sum vit vanliga gera er at taka hetta upp við veitaran sum teir brúka, sigur Jan Mortensen frá Føroya Tele

- Vit hava sostætt fejlmelda hetta til TDC í Danmark. Vit vilja víðari meta um vit skulu lukka fyri tí veitarinum, sum SMSini koma frá. Vansin er, at man eisini lukkar fyri øllum ørðum SMS og møguliga roaming/reiking samtalum í koma frá tí veitarinum, greiðir hann frá.

Jan Mortensen greiðir eisini frá, at hetta ikki hevur verið nakar stórur trupulleiki higartil, men at tað er ein vaksandi trupulleiki, og at Føroya Tele hava umhugsað at gera íløgu í eitt »spam« filtur til teirra sms-sentral í 2009.

# Nei takk til bústaðarskatt

TÍÐINDASKRIV

Feløgini í Samtak heita á landsstýrið og serliga formannin í Javnaðarflokkinum um at leggja allar ætlanir um bústaðarskatt til viks. Bústaðarskattur fer at raka skeivt og fer at tyngja serstakliga nógv um hjá fólki við lágum- og meðalinntøkum, hjá barnafamiljum, pensjónistum og fólki, ið nýliga hava sett búgv.

Bústaðarmynstrið í Føroyum hevur verið, at flest øll hava síni egnu sethús. Húsini kunna metast sum meir enn bara ein bústaður - hetta er heimið, sum familjan við bit og slit hevur stríðst fyri. Peningurin, ið latin verður fyri húsini er skattaður, mvg verður rindað av tilfarinum, rindað verður fyri grundstykki o.s.fr – hetta skuldi verið nóg mikið.

Samtak metir hugsanina handan bústaðarskattin vera grundleggjandi skeiva at seta í verk í Føroyum. Hetta hevði eisini verið serstakliga tyngjandi fyri tey, ið ikki hava fastar javnar inntøkur gjøgnum árið.

Samtak heitur heldur á landsstýrið um at skipa bústaðarmarknaðin betri, at tryggja fólk, ið seta búgv, at seta eina leigulog í gildi, at seta treytir við meklaravirksemi og ikki minst at leggja uppskot fram um lutaíbúðir. Hetta eru tiltrongdar broytingar, ið kunna vera við til at kollvelta føroyska bústaðarmarknaðin, sum í dag er merktur av, at tað eru alt ov fá rættindi til keyparar og leigarar, og at fólk í veruleikanum hava lítið og einki val, tá ið tey seta búgv.

Bústaðarskattur er ikki loysnin.

# Annika í Smiðjuni

**Fríggjadagin 16. januar 2009 verður framsýning í Smiðjuni í Lítluvík við Anniku Hjalt Jacobsen.**



Hetta er fyrsta almenna framsýningin, sum Annika hevur einsamøll. Fyrstu ferð vit sóu málningar hennara, var á Sandi í juli 2006. Hetta var sera væleydnað, tí allir málningarnir vórðu seldir. Annika, sum málar akrýlmálningar, hevur eisini sýnt fram á sølustevnu hjá B71 á Sandi og á Ólavsøkuframsýningini hjá Lions Club í 2008.

Málningaframsýningin hjá Anniku Hjalt Jacobsen fer av bakkastokki fríggjadagin 16. januar kl. 15 og heldur fram til mánadagin 19. januar 2009.